## Bankar offur fyri stórsviki



Fleiri europeiskir bankar standa nú fyri stórtapum eftir at vera svikaðir av Wall Street veteraninum, Bernard Madoff. Svikið, sum nærkast 50 milliardum dollarum (gott 281 milliardir krónur) greinar seg um allan heim. Bretski Royal Bank of Scotland hevur mist umleið 3,34 milliardir krónur, HSCB heilar 560 milliardir og Man Group góðar tvær milliardir krónur. Men tað eru ikki bert bretskir bankar, sum verða raktir. Japanski Nomura hevur mist 1,7 milliardir, franski Natixis 3,4 milliardir og italski UniCredit 560 milliónir krónur. Madoff varð handtikin hósdagin í síðstu viku og hevur sambært fleiri keldum viðgingið svikið. Hann hevur snýtt kundar sínar gjøgnum ein íleggingargrunn.

# Intrum skal heinta bøkur inn

**Innheintingarfyritøkan Intrum Føroyar, sum er best kend fyri at heinta pening inn fyri stovnar og fyritøkur, hevur nú skrivað sáttmála við Býarbókasavnið í Tórshavn**

INNHEINTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú skal innheintingarfyritøkan Intrum Føroyar hjálpa Býarbókasavninum í Havn av heinta bøkur inn, sum lánarar forsøma at lata aftur.

Nýggja mannagongdin verður, at tá ov long tíð er farin út um ásettu lánitíðina, verður rokningin send til Intrum Føroyar, sum síðani leggur innheintingargjald aftrat.

Býarbókasavnið vil tó altíð heldur hava bøkurnar aftur enn gjaldið fyri tær. Tí ber til at lata bøkur inn, sum eru farnar yvir lánitíðina, og bert gjalda vanligt gjald og umsitingargjald. Men er kravið sent til Intrum, verður eitt innheintingargjald eisini lagt oman á.



*Jákup Bech Jensen, stjóri í Intrum Føroyar*

- Vit ynskja at nýta alla okkara tíð á bókasavninum og geva lánarunum bestu tænastu. Samstundis ynskja vit at fáa allar bøkur aftur til tíðina, so onnur kunnu læna bøkurnar, sigur Anna Brimnes, býarbókavørður.

Ikki tí, aloftast verða bøkurnar bornar aftur til ásettu lánitíð, men Býarbókasavnið vónar, at hetta samstarv fer at hava við sær, at enn fleiri bøkur koma inn til tíðina, og at tey harvið fara at brúka minni tíð til at skriva áminningar og meira tíð til brúkarar.

### Fleiri bøkur inn

Fyri umleið 3 árum síðani gjørdu flestu bókasøvn í Íslandi sama sáttmála við Intrum. Hetta samstarvið hevur ført til akkurát tað, sum Býarbókasavnikð ynskir: fleiri bøkur koma aftur til tíðina, og harvið verður bíðitíðin eftir útlæntum bókum styttri.

- Tá ið samstarvið byrjaði í Íslandi, varð avgjørt, at geva lánarunum eina tíð at lata bøkur inn uttan at gjalda nakran kostnað. Í hesum tíðarskeiði fingu bókasøvnini umleið 10.000 bøkur aftur. Fleiri av hesum bókum høvdu verið læntar út í áravís, sigur Jákup Bech Jensen, stjóri í Intrum Føroyar.

- Vit ynskja at geva føroyingum sama møguleika og fara tí at bjóða øllum, sum hava lænt bøkur út um lánitíðina, at bera tær aftur ókeypis í tíðarskeiðinum 10. - 23. desember 200, sigur Anna Brimnes.

So hetta er ein góður møguleiki hjá øllum at hyggja á bókahillarnar, um bøkur hjá Býarbókasavninum av misgáum eru komnar at standa ov leingi.

# Eyðun í Listaskálanum



*Eyðun av Reyni, listamálari, hevur framsýning í Listaskálanum fram til 1. februar 2009*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nítjan málningar og umleið fimmtan vatnmálningar eru við á framsýningini hjá Eyðuni av Reyni, sum letur upp í Listaskálanum klokkan 17 í morgin**

MÁLNINGA-FRAMSÝNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er talan um bæði stórar og smáar málningar, sum listamálarin Eyðun av Reyni sýnir fram í Listaskálanum.

Málningarnir eru 19 í tali, hin største heilar tvær ferðir tríggjar metrar í vídd. Málningarnir eru allir málaðir í ár, men tó er onkur av vatnmálningunum frá í fjør og fyrraárið.

Eyðun av Reyni er listamaður burtur av, og tók útbúgving innan yrkið, frá 1971 fram til 1978. Heimaftur komin starvaðist hann í Svimjihøllini í Havn fram til 1996, tá hann fór at mála burtur av.

Hann hevur vanliga einar tríggjar fýra framsýningar um árið, og sýnir fram fleiri staðir, bæði í Íslandi, Danmark og Føroyum.

Íslendarar sýna stóran áhuga fyri føroyskari list, og eg hevði eina framsýning har í november mánaði, sigur Eyðun av Reyni.

Eisini í Føroyum ferðast hann runt við sínum málningum, eitt nú í Leikalund í Klaksvík og í Ribarhus í Fuglafirði.

Í sambandi við framsýningina í Listaskálanum kemur eisini ein bók út, sum Aðalsteinn Ingólfsson hevur skrivað, og sum Listasavn Føroya gevur út. Bókin inniheldur eina røð av málningum hjá Eyðuni av Reyni, bæði nýggjar og gamlar.

Framsýningin letur sum nevnt upp klokkan 17 í morgin og verður opin fram til 1. februar.